# HAVNIN

*– livandi, kveikjandi, skapandi*

Álit um mentan og list í Tórshavn Kommunu

*HAVNIN – livandi, kveikjandi, skapandi*
Álit um mentan og list í Tórshavnar kommunu
© 2000, Tórshavnar kommuna
Perma og Lay-out: Ingi Joensen, Grafik Studio
Fotomynd: Ingi Joensen
Akvarel á permu: Zacharias Heinesen
Tekningar: Zacharias Heinesen
Umbróting, repro og prent: Hestprent

ISBN 99918-3-074-X

# INNIHALD


**Fororð býráðsformansins** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **5**

**Inngangur** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **4**

**Meginsjónarmið** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **4**

**Mentamálini** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **4**

**Býráðið og mentamál** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **14**
Umsiting og viðgerð
Býarbókasavnið
Kunningarstovan
Játtanir og virðislønir
*Ynski og ætlanir*

**Skúlarnir** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **18**
Søgan í stuttum
Skúlin í dag
Kommunalu skúlarnir
Kvøld- og Ungdómsskúlin
*Ynski og ætlanir*

**Ítrótturin** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **23**
Arbeiði og náttúra
Skótarnir
Ítróttarfeløgini
Kappingarítróttur
Rørsluítróttur
*Ynski og ætlanir*

**Børn og ung** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **28**
Skipað og óskipað
Føroysk ungdómsmentan
Margarinfabrikkin
*Ynski og ætlanir*

**Tónleikur** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **31**
Kvøðing og sangur
Ljóðføristónleikur
Tórshavnar Musikkskúli

Yrkistónleikur
Spælistøð
*Ynski og ætlanir*

**Myndlist** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 36
Søga og umhvørvi
Tórshavnar býráð og myndlist
Arbeiðsumstøður
*Ynski og ætlanir*

**Sjónleikur** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 41
Søguligt yvirlit
Sjónleikur í dag
Áhugaleikur og yrkisleikur
Leikframleiðsla
*Ynski og ætlanir*

**Bókmentir og skaldskapur** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 46
Søga og umhvørvi
Bøkur og bókaútgáva
Arbeiðskor hjá rithøvundum
*Ynski og ætlanir*

**Søvn og stovnar** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 50
Felags minni, felags mentan
Føroya Fornminnissavn
Føroya Náttúrugripasav
Tórshavnar býarsavn

**Annað** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 54
Bygging
Livandi myndir
Telda og tøkni
Tiltøk tvørtur um mørkini

**Uppskot og tilmæli** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 58
Býarsøga
Høvuðsstaður og fyrisiting
Skúlasamstarv
Børn og ung
Høli til virksemi
Livandi miðbýur
Ársins William

# FORORÐ

Mentan er alt tað, sum fólk skapa ella hava skapað einsamøll ella í samstarvi við onnur. Í orðinum mentan liggur at menna gávur og førleikar og gera okkara felagsskap ríkari í huga og verki.

Havnin er felagsskapurin hjá okkum, sum her búgva, men Havnin er eisini høvuðsstaðurin í okkara landi. Tí hevur hon skyldu at taka væl ímóti øllum landsins borgarum. Samstundis er Havnin sambinding til umheimin, og higar koma fólk úr øðrum londum at vitja, at uppliva og í vinnuligum ørindum.

Ein virkin mentan gevur eitt virkið samfelag, har øll kunnu taka lut við sínum hugflogi og sínum royndum. Hugflogið og royndirnar koma frá einstaklingum og frá feløgum, men Tórshavnar býráð kann skapa karmar, ið gevur møguleikarnar at fáa okkara felags tilfeingi at vaksa og blóma, og býráðið kann við tiltøkum stuðla upp undir tað virðismikla, ið ikki enn hevur fingið umstøður at mennast.

Tórshavn, tann 25. apríl 2000,

Leivur Hansen,
býráðsformaður

# INNGANGUR

Í januar 1999 setti Tórshavnar býráð ein arbeiðsbólk at gera uppskot til ætlan fyri framtíðar mentanararbeiðið í kommununi. Arbeiðsbólkurin fekk víðar ræsur til sjálvur at leggja arbeiði sítt til rættis. Spurningurin, hann hevur sett sær, kann samanfatast soleiðis: Hvat kann býráðið gera til best at fáa eina livandi og fjølbroytta mentan í okkara býi og okkara kommunu?

Arbeiðið hevur natúrliga verið í trimum pørtum:

1. at kunna seg um tað mentunarliga arbeiðið, sum er,
2. at meta um støðuna, og
3. at gera niðurstøður og tilmæli.

Arbeiðið hevur tikið støði í, at Havnin er bæði heimkommuna hjá sínum borgarum og høvuðsstaður í landinum við teimum møguleikum og skyldum, sum hetta hevur við sær.

Bólkurin hevur á fundum og vitjanum havt samband við umboð fyri felagsskapir og stovnar og hevur roynt at farið víða um, so sum sæst í fundarfrágreiðingunum. Men bólkurin veit, at annað mentanarligt virksemi er til í býnum, sum eisini átti at verið umrøtt, og skal her serliga nevna trúarlívið, sum sjálvsagt er ein ógvuliga týðandi og grundleggjandi partur av okkara mentan. Bólkurin ásannar tó, at hetta er so stórt og umfatandi øki, at býráðið møguliga á annan hátt og í beinleiðis samstarvi við kirkjuna og samkomurnar eigur at lýsa hesi viðurskifti.

Í mentanarbólkinum hava verið:

Birgir Kruse, formaður
Elsa Jóhanna Høgenni
Jógvan Jensen
Niels Nattestad
Napoleon Nólsoy
Bárður Jákupsson
Gunnar Hoydal
Jákup Simonsen.

Gunnar Hoydal hevur verið skrivari í bólkinum.

# MEGINSJÓNARMIÐ

### *Søguligur býur*

Havnin er býur fullur í søgu og fullur í søgum. Í túsund ár hevur ting verið hildið í Havn, og gamli býurin er varðveiddur og livir enn sum eitt einastandandi stað í heiminum. Søgan er sjálvur botnurin undir mentanini og tað støðið, sum verandi og komandi mentanararbeiðið byggir á. Men enn er merkiliga lítið gjørt við at skriva søguna og miðvíst at savna vitnisburðir um farna tíð.

### *Heimbýur*

Havnin er stórur býur eftir okkara viðurskiftum, viðhvørt so stórur, at fólk, sum fyrr kendu hvønn einstakan, nú kunnu fara at ivast í nøvnunum á nýggum býlingum, ikki um at tala á gøtunum.

At gera hann heimligan er at gera býlingarnar virknar í gerandislívinum. Har skal vera gott og trygt hjá børnunum at vera, rúm skal vera fyri bæði skipaðum og óskipaðum tiltøkum. Í nýggjum býlingum eiga at vera møguleikar fyri byggingum av ymiskum slagi og í ymiskum støddum, so at fólk í øllum aldri kunnu vera har og ættarliðini koma saman natúrliga. Møguleikar eiga at vera fyri virkjum og fyritøkum, ið ikki eru til ampa fyri bústaðirnar, hetta fyri at geva eitt meira fjøltáttað umhvørvi.

Eigarafeløgini eiga at styrkjast, og grannafeløg eiga at setast á stovn, har eingi eigarafeløg eru.

### *Miðbýur*

Eru býlingarnir heimastøðini, so er miðbýurin felagsstaðurin. Hagar koma tey úr øllum býnum og allari kommununi at vera saman í felagsskapi.

At styrkja miðbýin sum mentanarligan miðdepil er at geva øllum býnum lív. Matstovur, filmssýningar, framførslur, framsýningar, bóka- og miðlasavn eiga at hava góðar umstøður í sjálvum miðbýnum, og serliga eigur at verða hugsað um teir møguleikar, sum tann blómandi tónleikurin átti at fingið við umstøðum at vant og spælt fyri fólki í ymiskum høpi.

Í miðbýnum eigur eisini tann kunningin um býin og tiltøk í býnum at vera, sum hevur so stóran týdning bæði fyri borgararnar og fyri ferðafólk, sum koma til býin. Ein virkin kunning við góðum umstøðum at veita fyriskiparum hjálp hevði verið eitt avgjørt framstig fyri felags mentanina í býnum.

### *Høvuðsstaður*

Havnin er landsins høvuðsstaður, og í Havn eru stovnar og virksemi, ið ikki finnast aðrastaðni í landinum ella hava høvuðssæti her. Nevnast kunnu hægri skúlarnir, Sjónleikarhúsið, Listaskálin og søvnini, tey stóru gistingarhúsini, útbygda ítróttarøkið í Gundadali og Norðurlandahúsið við sínum víða sambandi út um oyggjarnar og til øll norðurlond.

Ólavsøkan er landsins høvuðsstevna og okkara hugmynd av tign, samanhaldi og felagsskapi. Meira og meira fáa aðrar stevnur týdning, tónleikastevnurnar á sumri ikki minst. Stevnur og tiltøk sum landadystir í ítrótti draga fólk til sín, útlendsk ferðafólk koma til býin, sambond skapast, sum bera vøkstur við sær.

Havnin er landsins andlit úteftir, og mentanin er mangan tað, sum gestir og samstarvsfelagar hava áhuga at kunna seg um. Tað gevur býráðnum skyldu at hugsa um dygd á høgum støði.

## *Vinnulív*

Mangt bendir á, at eisini vinnulívið fær vaksandi áhuga fyri mentanini. Alt meira hoyrist frá stórum fyritøkum, at størsta tilfeingið í framtíðini verður hugflogið, sum er innan í fólki, og at tað skapandi og nýhugsandi menniskjað er sjálv fyritreytin fyri framburði og virksemi í framtíðini.

Eitt virkið mentanarlív skapar gróðrarlíkindi fyri nýhugsan í vinnulívinum, og nú ein møgulig oljuvinna stendur fyri durum er umráðandi, at henda nýggja stórvinnan finnur eitt kjølfesti í landsins egnu mentan. Henda vinnan verður ein avbjóðing fyri alt samfelagið, og til at viga upp ímóti, er sett fram tað uppskot, at av hvørjari tunnu av olju skal ein pottur fara beinleiðis til føroyska mentan.

Sponsorering ella stuðul frá vinnulívi er ikki longur ivamál. Tað avgerandi er, at mentanin kann nýta peningin óheft og til endamál, sum hon sjálv ger av.

## *Fyri øll*

Ein virkin mentanarpolitikkur eigur at vera fyri øll. Fólk fáa gleði og sjálvsálit í einum arbeiði, har hugurin skipar fyri, men ofta eru tað tey, sum frammanundan eru sterk og virkin, ið taka við teimum møguleikum, sum eru.

Tiltøk eiga tí at verða framd, sum kunnu fáa tey veikaru við, børn, ung og gomul, og møguleikar eiga at vera eisini hjá teimum, sum ikki orka ella hava hug at vera við í ítrótti, tónleiki ella øðrum meira skipaðum felagsarbeiði.

Ein virkin mentan er besta verjan móti einsemi og ráðaloysi. Sostatt er ein virkin mentanarpolitikkur samstundis ein virkin sosialpolitikkur.

## *Breidd og hædd*

Mentanin eigur at vera fyri øll, hon eigur at vera breið og fáa flest møgulig við. Men burtur úr breiddini koma tey við serstøkum gávum og serstøkum ágrýtni. Breiddin gevur teimum dugnaligastu førleikan at lyfta heildarstøðið upp á hægri stig.

Men soleiðis sum munur er á breidd og hædd, soleiðis er eisini munur á mentan og list. Listin roynir tær ógongdu leiðirnar og setur mangan spurnaðartekin við hevdvunnu mentanina. Hon er ofta í andstøðu og kann vera torskild og bjóða beinleiðis ímóti. Kortini er hon neyðuga saltið í allari mentan og er tann megin, sum gevur mentanini nýtt blóð.

Umstøður eiga at verða fyri báðum: Áhugamentan og yrkislist. Markið kann vera flótandi og eigur at vera skiftandi í øllum hugsandi samstarvi. Men tá ið saman um kemur, livir áhugamentanin av avlopsorkuni hjá teimum hugaðu, meðan yrkislistin krevur alla orku fult og heilt í stytri ella longri tíðarskeiði. Tí er tann avgerandi munurin, at áhugamentanin krevur góðan stuðul, meðan yrkislistin krevur støðuga fígging.

## *Grundmentan*

Innan vísindi er grundgransking tann botnurin, sum alt annað vísindaligt arbeiði byggir á. Hetta er gransking, sum hevur til endamáls at vinna størri kunnleika uttan at hugsað verður um beinleiðis verklig úrslit. Men tað, sum henda gransking gevur, kemur síðani til sjóndar aftur í stórum, ofta óvæntaðum, virksemi aðrastaðni.

Á sama hátt ber til at tosa um eina grundmentan í einum samfelagi, ta leitandi og kannandi mentanina, ið ber annað virðismikið við sær. Men skal hesin felags mentanarbotnurin vera á høgum støði, so mugu góðar arbeiðsumstøður vera. Listafólk kunnu sigast at vera grundgranskarar á hesum øki, og hjá teimum ræður um fyrst av øllum at fáa arbeiðsfrið.

Tað er tí umráðandi, at tey evnaríkastu listafólkini kunnu arbeiða burturav við list síni, til dømis við starvsløn í einum ávísum tíðarskeiði.

### Karmar og treytir

Býráðið hevur stuðlað og stuðlar framvegis nógvum ymiskum felagsskapum og mentanarligum tiltøkum. Eftir samrøðurnar, bólkurin hevur havt, tykist tørvur vera á greiðari reglum og javnsettum treytum fyri tey ymisku økini.

Felags fyri nógvar felagsskapir er tann stóra orkan, ið fer til at halda virkseminum uppi við innsavningum, bingo, køkutombola og øðrum, og mangan verður nevndararbeiðið eitt støðugt stríð at skipa fyri inntøkugevandi tiltøkum. Lítil orka verður tá eftir at arbeiða fyri meginendamálinum hjá felagsskapinum.

Felags ynski hjá nógvum er at fáa hjálp frá býráðnum at útvega hóskandi høli til virksemi, og umstøðurnar eru ymiskar, til dømis innan fyri fimleikin. Trot er á tímum í verandi hallum og bygningum.

Býráðið setur karmarnar og treytirnar, men tá ið talan er um listaligar spurningar, eigur viðgerð ella tilmæli at leggjast til nevnd við serligum førleika, so sum longu verður gjørt við M. A. Jacobsens-nevndini og nevndini fyri barnabókmentir. Raðfestingin eigur at verða ásett í virkisætlan, sum kann fevna um nøkur ár, til dømis eina hálva býráðssetu í senn.

### Játtan

*Ein virkin mentan kostar. Játtaði peningurin er ikki útreiðsla, men innløga. Hann er íløgan í eitt sterkt, livandi og kensluríkt samfelag.*

# MENTAMÁLINI

## BÝRÁÐIÐ OG MENTAMÁL



### *Umsiting og viðgerð*

Hóast mentamálini í Havnini eru stór og víðfevnd, so hevur umsitingin av mentamálum altíð verið avmarkað, og mentamáladeildin hevur verið og er framvegis minsta deildin í býarumsitingini. Deildin hevur samskiftið við fólkaskúlarnar, musikkskúlan, kvøld- og ungdómsskúlan, listaskúlan, býarbókasavnið, kunningarstovuna, svimjihøllina, stadionøkini, ítróttafeløgini og onnur feløg og einstaklingar, sum fáa ella søkja um studning, og nevndarskrivarin leggur til rættis og avgreiðir øll mál, sum koma fyri í mentamálanevndini. Hann er harumframt skrivari í Tórshavnar skúlaráð, sum við 25-30 fundum árliga er virkin og sjálvstøðug nevnd, ið m.a. ger tilmæli um lærarasetanir í føstum størvum og setur lærarar í fyribilsstørv. Hann fyriskipar hátíðarhald av ymiskum slag, m.a. tá ið árligu heiðurslønirnar verða latnar.

Mentamálanevndin hevur ábyrgd av týðandi rakstrarstøðum á býráðsins fíggjarætlan, men stóri parturin av viðgerðum hevur at gera við tær einstøku umsóknirnar um stuðul til mentanaraarbeiði av ymiskum slag, útgávur av bókum og fløgum, stevnur, framførslur v.m. Upphæddin til mentanarstuðul er vaksin munandi seinastu árini, men tørvur er á nærri greinaðum mannagongdum fyri viðgerðum og raðfestingum.

## *Býarbókasavnið*

Býarbókasavnið ger sínar tænastur í stillum, men er ein tann týdningarmesti mentanarstovnurin í býnum. Bókasavnið hevur einar 60.000 vitjanir árliga, og serliga er eitt vaksandi tal av børnum og ungum, nú teldur eru komnar og geva samband til alnetið og kunnu nýtast bæði til skúlaarbeiði og ítriv. Bókasavnið er sambinding millum farandi og komandi mentan, og savnið er í fyrsta lagið bøkurnar. Men í eini tíð við skjótt vaksandi samskifti allar vegir er umráðandi at hava eina tænastu, sum á høgum fakligum støði kann útvega upplýsingar og vegleiða í tí ørgrynnu av møguleikum, sum eru.

Býarbókasavnið er miðstætt í býnum, og lesistovan er eitt savningarstað við nógvum dagligum vitjanum. Í 1993 varð lagt aftur at teimum ógvuliga trongu bókasavnshølunum, sum tá vóru. Hetta er tó at meta sum fyribils loysn, eftir at ætlanin um nýtt býarbókasavn millum sjómansheimið og posthúsið varð løgd til viks, og longu nú er næstan líka trongt sum fyrr, serliga á barnabókasavninum og í teimum nýggju tænastunum. Tónleikur og sangur er stórur partur av mentanarlívinum í Havn, men plásstrotið ger, at bókasavnið fær ikki bjóðað tænastu á hesum øki. Umstøðurnar hjá fólki at koma til og úr bókasavninum eru heldur ikki forsvarligar, og tað er beinleiðis skomm, at eldri og rørslutarnað eru útihýst frá hesi týðandi almennu tænastuni.

## *Kunningarstovan*

Kunningarstovan varð sett á stovn fyri at fremja handil og ferðavinnu í býnum, og serliga var ætlanin at fáa ein livandi og hugnaligan miðbý og soleiðis økja virksemið har. Meira og meira er kunningarstovan blivin ein stovnur, sum savnar allar upplýsingar um Havnina, og hagar kunnu øll venda sær við spurningum og ivamálum. At ferðafólk kenna seg væl og støðast í býnum er høvuðsuppgávan á sumri, men tiltøk eru

alt árið, eisini fyri borgarar í býnum, so sum væl umtóktu gonguferðirnar eru dømi um.

Kunningarstovan er sambindingarliður millum tey ymisku mentanartiltøkini í kommununi, og er nú, umframt at vera vinnufremjandi, ein týðandi mentanarstovnur í býnum, eitt fryntligt og fyrikomandi andlit, sum øll kenna. Fíggjarliga orkan er tó lítil, og óvissan um framtíðar húsaviðurskifti er ein dagligur trupulleiki.



## *Játtanir og virðislønir*

Játtanirnar til mentamál hava verið vaksandi hesi seinastu árini, bæði teimum sum býráðið sjálvt hevur ábyrgdina av og teimum, sum tað letur studning til. Sum einasta kommuna í Føroyum hevur Tórshavnar kommuna latið heiðurslønir fyri mentan og list. Viðhvørt hevur nakað av kjaki staðist av hesum, kanska serliga av M. A. Jacobsens heiðurslønini, men eingin ivi er um, at tær hava havt stóran týdning fyri tey fólkini, sum hava fingið hesa viðurkenning, og býráðið hevur samstundis fingið nógva og góða umtalu. Tí er vert at umhugsa at lata viðurkenningar eisini á øðrum økjum, sum tildømis í bygging og urtagarðsrøkt, og soleiðis stimbra áhugan hjá fólki at fara væl um.

## *Ynski og ætlanir*

*Mentamáladeildin er nú partur av nýskipaðu trivnaðardeildini. Við at skipa hesa nýggju høvuðsdeild hevur býráðið lagt dent á, at ynskið hjá býráðnum er at fáa ein bý, har fólk trívast og kenna seg væl. Ein virkin og fjølbroytt mentan er eyðkennið fyri eitt livandi samfelag. Tað skapar virkishug og fyribyrgir vantreysti og vónloysi.*

*Tí eigur mentanararbeiðið at styrkjast við tiltøkum, sum býráðið sjálvt skipar fyri, og samstarvið við tað stóra sjálvbodna arbeiðið í býnum eigur at mennast. Kommunan eigur*

*at leggja dent á tiltøk, sum koma øllum býnum til góða, og stóran mun hevði tað gjørt, um kommunan kundi umsitið tað verkliga, sum skal til, tá ið til dømis stevnur og onnur størri tiltøk eru í býnum. Tað kundi verið gjørt við at styrkt um mentanardeildina og kunningarstovuna, so arbeitt kundi verið við miðvísum ætlanum fyri tiltøkum fram í tíðina, Summartónum, Jazz, Fólka og Bluesfestivalinum og ráðstevnum, tiltøkum, sum samstundis eru við til at gera Havnina kenda í øðrum londum. Kunningarstovan má fáa størri arbeiðsorku og húsaspurningurin má loysast.*

*Greiðar reglur eiga at vera fyri stuðulsveitingum, so at umsóknir kunnu viðgerast á sama grundarlagi. Tað er framstig, at umsóknir nú verða savnaðar og viðgjørdar bara fáar ferðir árliga, so tær kunnu samanberast. Men tað slepst ikki undan í framtíðini at gera metingar av dygd og av ávirkan fyri heildina, soleiðis at tað eru tey bestu tiltøkini og tey, sum hava størsta týdningin fyri býarmentanina, ið verða raðfest ovast og fáa stuðul, sum munar.*

*Umstøðurnar hjá býarbókasavninum mugu bøtast. Atgongd má verða fyri øll til hølini, sum nú eru, men víðari ætlan má leggjast fyri bókasavnið í framtíðini. Býarbókasavnið eigur at vera i sjálvum miðbýnum, og tað kann tá gerast eitt gott sambindingarlið til tey virkishús, ið longu eru í Tórsgøtu, og tey, sum seinni kunnu taka seg upp har við spælistøðum, livandi tónleiki, matstovum og øðrum, ið kann styrkja eitt livandi, nútíðar býarlív*





# SKÚLARNIR

## *Søgan í stuttum*

Havnin er landsins miðdepil og av tí sama eisini miðdepil í landsins skúlaskapi. Soleiðis hevur verið síðani trúbótina, tá ið prestaskúlin í Kirkjubø varð avtikin. Men ikki altíð hava umstøðurnar verið góðar. Eingin almennur barnaskúli var, og latínskúlin við sínum rektara ikki meira enn andi, til hann varð niðurlagdur í 1804. Skúlaskylda fyri øll børn, ið høvdu fylt 7 ár kom fyrstani í 1854, og almúguskúlin varð skipaður úti á Reyni, har sum latínskúlin hevði verið. Har gjørdist ov trongt, sum býurin vaks, og í 1894 var tann stásiligi, grótlaðaði kommunuskúlin vígdur, men í fleiri ættarlið vóru teir nógvu privatskúlarnir eitt eyðkenni fyri skúlaskapin í Havnina. Thorshavns Mellem- og Realskole varð bygdur í 1861, og landsins hægri skúlar komu so við og við. Fróðskaparsetur Føroya varð sett á stovn í 1965 og fekk í 1990 støðu sum lærdur háskúli.

## *Skúlin í dag*

Upplýsing og góður skúli er grundstøðið undir menning og mentan í samfelagnum, og skúlin broytist, so sum samfelagið broytist. Stórur munur er á frálæruni í tí gamla skúlanum við tí mangan stranga, einaráðandi læraranum og dagsins opna skúla, har lærarin gerst alt meira vegleiðarin, ið skal vísa tí einstaka næminginum á gongdar leiðir í huga og í tøkni, nú telda og alnet lata upp fyri næstan markleysum møguleikum. Ein skúli, har næmingar ikki longur bara taka ímóti, men sjálvir skulu skapa og lata frá sær kunnleikar og førleikar. Sum í samfelagnum annars fær tað týdning at orða ætlanir, at samansjóða upplýsingar, at seta tær í samband við veruleikan og gerandisdagin, at lýsa tær og meta um tær og leggja evnið fram fyri onnur. Skapandi gávur fáa meira at siga, og tillagingarførleikin, førleikin at laga seg til skiftandi umstøður, verður avgerandi.

Tó, hetta eru breiðari samfelagsmál, sum enn bara hómast, og Tórshavnar kommuna hevur við skúlaskipanini, sum er, avmarkaðar møguleikar at ávirka sjálvt innihaldið í skúlanum, hvat skal lærast og hvussu.

## *Kommunalu skúlarnir*

Kommunan hevur ábyrgd av skúlabygningunum og skal ansa eftir, at nóg mikið er til av skúlastovum og tilfari, at reint er inni og úti, at húsini verða væl umsitin og annað, sum í fyrstu atløgu ikki tykist at hava nógv við mentanarligt innihaldið at gera. Men tað vísir seg beinanvegin, at góð hølisviðurskifti eru avgerandi fyri, um nakað mennandi virksemi fær verið ella ikki.

Hóast skúlaskapurin er nógv broyttur við øðrvísi undirvísingarhættum, nógvum nýggjum og fjølbroyttum undirvísingartilfari og framkomnari tøkni, so eru bygningarnir teir somu

og skúlastovurnar so at siga tær somu, sum tær altíð hava verið. Í teimum vanligu skúlastovunum er ikki lætt at umskipa seg í størri og minni bólkar og hava skiftandi arbeiðslag, so sum tann nýggja tíðin krevur.

Vanlig hugsan hevur verið, at ein skúli er ein skúli og skal bara nýtast til at undirvísa í skúlatíðini. Henda hugsan er broytt tey seinnu árini, og kvøldskúlin er á flestu skúlum virkin til seint á kvøldi. Kortini eru bæði vanligar skúlastovur og serstovur tøkar ymsastaðni í býnum hvørt kvøld í viku og hvørt vikuskifti. Hóast praktiskir spurningar eru í hesum, so er her er eitt tilfeingi, sum kundi verið meira nýtt í einum virknum frítíðararbeiði.

Á bygd varð skúlalaðið ella skúlagarðurin eitt savningarstað til leik og spæl um kvøldið hjá ungdóminum í bygdini. Skúlagarðarnir í Havn eru lítið lokkandi, og kanska tí verða teir ikki brúktir av øðrum enn næmingunum í fríkorterum. Eisini her er eitt ónýtt tilfeingi í teimum grannaløgum, har skúlarnir standa.

## *Kvøld- og Ungdómsskúlin*

Kvøld- og Ungdómsskúlin er eisini ein kommunalur skúli, tann størsti av øllum, um roknað verður eftir næmingatalinum, ið liggur um 3000. 150 lærarar eru í 37 ymiskum skúlahølum, og meir enn 100 ymisk undirvísingartilboð eru á skúlaskránni hvønn vetur. Her er talan um handverk og handarbeiði av ymiskum slag, bóklig undirvísing, tilboð til rørslutarnað og menningartarnað, frítíðarvirksemi til børn og ung og mangt annað. Her ganga fólk í øllum yrki og øllum aldri saman, og tað sosiala sambandið millum næmingarnar er sterkt.

Hetta fjølbroytta og týðandi virksemið verður stundum gloymt, tá tosað verður um skúlarnar í býnum, og kvøldskúlin hevur øll árini skulað hjálpst við tí, sum eftir er, tá ið hinir skúlarnir hava fingið sítt, ella tá ið kommunan sjálv hevur

skulað nýtt hølini til sítt egna endamál. Tí er ein støðug flyting úr hølum í høli, og skúlin hevur í mongum førum ikki kunnað lagt ætlanir og ikki vitað, hvat var til taks, tá ið skúlatíðin byrjaði og skráin varð lýst. Neyðin er serliga stór á hølum, sum krevja útgerð og umstøður, sum ikki fáa verið í vanligum skúlastovum.

Hóast umstøðurnar eru ringar, so trýtur ikki áhugin hjá fólki, og á hvørjum ári má skúlin vísa næmingar frá sær, tí hann hevur ikki høli og fíggjarliga orku til størri virksemi.

### *Ynski og ætlanir*

*Tá ið farið verður undir skúlabygging aftur, eigur at verða skipað so fyri, at skúlin lættliga kann umskipast og broyta støddir á hølum og skúlastovum eftir tørvi. Gongir og felagsrúm eiga at gerast soleiðis, at umstøður verða at arbeiða ein og ein ella í bólkum, og Havnar kommuna eigur at ganga á odda í kunningartøknini og ansa eftir, at skúlarnir hava ta útgerð, sum krevst.*

*Skúlarnir eiga at gerast meira virknir í umhvørvinum, har teir standa, og verða opnir fyri skipaðum og meira óskipaðum tiltøkum, sum fólk í grannalagnum taka upp á seg og standa fyri. Sama er við skúlagørðunum. Teir eiga at bøtast og umskipast, so tað verður lokkandi at nýta teir til uttandura endamál av ymiskum slag.*

*Sum er, hittast 6. flokkarnir úr øllum Føroyum eina ferð um árið til ítróttardag. Framhaldsskúlarnir eru farnir undir samstarv millum 10. flokkarnar um sonevndu breytarskipanina. Samstarvið er spennandi og mennandi fyri allar partar og átti at verið økt til at fevna um aðrar flokkar við. Til dømis kundi verið ein árlig dansistevna, ein kórstevna, solist-stevnur við ymiskum ljóðførum og stevna við skúlasjónleiki. Hugskot er at eggja næmingunum til at fara væl um umhvørvið, ikki minst sína egnu heimastovu. Hetta kundi verið*

*gjørt við at valt ársins skúlastovu á hvørjum skúla ella í allari kommununi.*

*Kvøld- og Ungdómsskúlin eigur at fáa góðar og tíðarhóskandi umstøður til tað virksemið, sum ikki fær verið í øðrum skúlum. Til tær lærugreinar, ið eru nógv umbidnar og krevja stórt pláss og nógva útgerð, eigur skúlin at fáa høli, sum hann sjálvur ræður fyri.*






# ÍTRÓTTUR

## *Arbeiði og náttúra*

At røkta bø og haga, at velta upp úr nýggjum, at ganga til neytar, at rógva út í øllum veðri: Tað er ikki so langt síðani, at eitt ófatiligt stríð og strev var í øllum arbeiði. Amboðið var kroppurin sjálvur, og dagliga sambandið við náttúruna var sjálvsagt.

Nú eru amboðini onnur, og arbeiðið øðrvísi. Fólk sita inni, og Havnin er sum aðrir høvuðsstaðir ein umsitingarbýur við skrivstovum allastaðni. Bilar koyra ímillum, og hjá nógvum er næstan ikki neyðugt at røra seg. Ofta verður sagt, at børn duga ikki ella tíma ikki at spæla úti longur, tey vilja heldur sita inni framman fyri sjónvarpinum ella telduni.

Men likamið krevur at verða brúkt. Tí síggja vit, at samstundis sum tað likamliga arbeiðið minkar, so veksur tørvurin á skipaðum og óskipaðum tiltøkum til at mýkja vøddarnar og røra kroppin, og tað er framvegis so, at sálin trívist best í einum frískum likami.

## *Skótarnir*

Í kommununi eru fimm skótalið, ið gera eitt virkið frítíðararbeiði. Hvørt skótalið er skipað í aldursbólkar, íalt einir 450 skótar, sum læra at loysa settar uppgávur, hava felagstiltøk og skipa fyri skótalegum og tiltøkum um sumrarnar. Skótarnir skipa fyri árliga flaggdagshaldinum og eru við í vanligu skrúðgongunum í býnum.

## *Ítróttarfeløgini*

Meira og meira lata foreldrini og samfelagið tað til tey ymisku ítróttarfeløgini at geva børnunum og ungdóminum nakað skilagott at gera í frítíðini. Ítrótturin hevur stóran menniskjansligan og uppalandi týdning, og í ítróttarfeløgunum lærir tú virði at kenna so sum

- at arbeiða saman við øðrum,
- at lurta og meta um tað, tú hoyrir,
- at hava tol við onnur, sum kanska hugsa øðrvísi enn tú sjálvur,
- at góðtaka spælireglurnar í fólkaræðinum,
- at góðtaka at vera rættaður, so tú kanst búnast og mennast,
- at skilja teg sjálvan, kropsliga, sálarliga og sosialt,
- at tapa og vinna,
- at uppliva gleðina, sum tað er, at brúka sín kropp rætt.



Ítrótturin kann fáa børn og ung inn í eina góða ringrás, og tað hevur víst seg, at hann kann geva teimum góðar vanar, so tey

- roykja minni,
- drekka minni rúsdrekka,
- nýta minni rúsevni,
- eru betri fyri í skúla og til arbeiðis
- trívast betri,
- hava størri sjálvsálit,
- plágast minni av tunglyndi og angist.

## *Kappingarítróttir*

Í Havnini eru nógv ítróttarfeløg, og umstøðurnar hjá teimum eru rættiliga ymiskar. Eisini innan ítróttin sæst tann gongdin aftur, at bæði breiddin og hæddin veksur. Størst eru tey bæði stóru fótbóltsfeløgini, ið tey seinastu árini hava fingið nógv betri umstøður við vøllum og rúmsáttum felagshúsum. Samstundis sum eitt stórt sosialt arbeiði verður gjørt sjálvboðið og ókeypis, hava feløgini, nú føroyskur fótbóltur er partur av altjóða fótbóltsamstarvinum, skipað seg meira og meira sum í útlendskum fótbólti við løntum spælarum og løntum hjálparfólki. Ítrótturin er hjá teimum dugnaligastu blivin eitt yrki. Smápartafelag er stovnað, sum skal umsita tey vinnuligu áhugamálini, stuðlafeløg eru innan fyri feløgini, og tey hjálpa við at útvega pening, lata fast mánaðarligt stuðlagjald, stuðla liðunum, tá ið dystir eru, skipa fyri familjufótbólti um várið og summarið og hava innkrevjingina um hendi, tá ið felagið hevur heimadyst.



Somuleiðis gera hini ítróttarfeløgini, hondbólts-, flogbólts-, svimji-, róðrar-, fimleikafeløgini og onnur eitt stórt og týðandi samfelagsligt arbeiði. Av tí at lima- og áskoðaratal er minni og fíggjarligu møguleikarnir trengri í hesum ítróttum, verður tað nógva arbeiðið gjørt av áhugaðum foreldrum, nevndarlimum og sjálvbodnum, og nógv tann størsta orkan, sum krevst fyri at halda felagnum uppi, fer til innsavningar, bingo, køkutombola og onnur líknandi tiltøk fyri at útvega pening. Av tí sama er ofta trupult at manna nevndir, og lítið verður eftir hjá teimum virknu fyriskiparunum til tað ítróttarliga.

## *Rørsluítróttur*

Umframt tað virksemið, sum er fyriskipað í feløgum, er stórur áhugi hjá fólki í øllum aldri fyri meira óskipaðum motións-

ella rørsluítrótti. Fyritøkur og stovnar hava starvsfólk, sum hittast eina ferð um vikuna at renna ella spæla bólt, grannar taka seg saman at gera útferðir, gongubólkar fara á fjøllini ella gera sær kunningarferðir í býnum, einstaklingar renna eftir vegum og gøtum um kvøldarnar og í fríløtum. Her er ikki talan um kappingar, sum vanligt er í ítróttafeløgum, men um ítriv og spæl, sum gevur óbindandi samband við onnur og samstundis er gott fyri heilsuna. Júst hetta óbindandi tykist at vera kjarnin í hesum virksemi, men einki er at ivast í, at her er talan um fyribrigdi av stórum týdningi fyri fólkaheilsuna og vælferðina hjá mongum.

### *Ynski og ætlanir*

*Ítróttar- og rørslumøguleikar eiga at standa øllum borgarum í Havn í boði, og tað er umráðandi at hava bæði hópítrótt og úrvalsítrótt. Feløgini eiga í størsta mun at verða viðgjørd á sama hátt og við atliti til slag og limatal fáa somu møguleikar at virka og mennast.*

*Felags fyri nógv feløg er, at tey kundu hugsað sær fleiri venjingartímar og betri hølisviðurskifti. Í hesum sambandi verður víst á Gundadalshøllina, sum er fyrireikað til at kunna gerast tvíhøll, samstundis sum tá verða umstøður at fáa eina veruliga dystahøll til teir stóru dystirnar við nógvum áskoðarum.*

*Yvirhøvur er Gundadalur sjálvur ítróttarligi miðdepilin í býnum og landinum, og tí er rætt at gera sum mest fyri, at eisini frælsi ítrótturin fær verið í Gundadali. Frælsi ítróttinum er fjølbroyttur meginítróttur í øllum heimsins londum, so sum sæst best í sambandi við olympiadurnar. Men hjá okkum fær hann ikki sín rætta týdning, verður ikki veittur honum umstøður millum hinar stóru ítróttirnar, og verandi stadionøkið ber ikki sítt navn av røttum, so leingi frælsi ítrótturin er útihýstur har. Tað kann leggjast afturat, at ítrótt-*

*urin fyri brekað hevði kunnað verið mentur munandi við einum veruligum stadion í býnum.*

*Tað er tungt at arbeiða hjá nógvum feløgum, og kommunan eigur at stuðla soleiðis, at feløgini sum mest kunnu savna seg um ítróttin, hetta tó uttan at taka ábyrgdina, heldur ikki ta fíggjarligu, frá nevndum og limum.*

*Kommunan eigur at geva tí breiða rørsluítróttinum gætur og kann við at halda fram við hepnu gøtugerðunum fram við áum og gjøgnum frílendi stuðla undir hesum virksemi, samstundis sum nýggj fríøki og náttúruøki verða latin upp fyri almenninginum.*

*Kappingarfimleikurin hevur ikki nóg góðar møguleikar, og umstøður áttu at verið hjá teimum dugnaligastu at hava somu útgerð og amboð, sum tey hava, ið tey skulu kappast við.*

*Fleiri ítróttargreinar taka seg upp og royna at menna seg. Sum dømi kann verða nevnt vetrarítrótturin. Tað hevði borið til at skipað fyri skreiðigøtum og skoytuøki, tá ið umstøður eru, og seinastu árini hava bólkar av skíðfólki hitst á Sornfelli og gjørt sær breytir har. Longsta breytin er einar tveir kilometrar, og hevði kommunan kunnað stuðlað við at rudda grót og sett girðingar, sum fekk kavan at støðast, so hevði skíðing eisini hjá okkum kunnað gjørst ein góður og gagnligur ítróttur.*

*Aðrir ítróttir kundu verið nevndir, so sum golf og ríðing, ið tykjast at hava serligan áhuga hjá ferðafólki. Yvirhøvur gevur ítrótturin nógv mennandi samband við umheimin, men fyrst og fremst er eitt virkið frítíðarlív umráðandi fyri alt samfelagslívið og ikki minst fyri børnini og tann uppvaksandi ungdómin.*



# BØRN OG UNG

## *Skipað og óskipað*

Nógv frítíðarvirksemi er at fara til hjá børnum og ungum í Tórshavnar kommunu: Fótbóltur, hondbóltur, flogbóltur, svimjing, fimleikur, tónleikur, skótar og mangt annað. Hjá teimum virknu er viðhvørt so nógv at fara til, at samdøgrið strekkir illa til, og foreldur pøsa seg at koyra tey higar og hagar, skulu tey kunna verða við í øllum, sum tey hava hug til. Hetta er alt fyriskipað virksemi, har vaksin eru uppií, leggja til rættis og halda skil á.

Børn í dag eru meira undir eftirliti enn fyrr. Arbeiðslívið hjá teimum vaksnu er broytt, bæði foreldrini eru vanliga til arbeiðis, og sjálvt um ein vaksin er heima, so standa hús og grannalag tóm í arbeiðstíðini, og skuldu børnini verið har, høvdu tey ongan havt at spælt við. Dagrøkt og dagstovnar eru tí natúrliga blivin partar av almennu uppalingini. Men børn hava eisini tørv á óskipaðum virksemi, at spæla saman, beistast og kappast uttan at vaksin eru uppi yvir teimum í heilum.

Partur av hesum er farin yvir á tólini og tøknina. Fyrr var tað so, at børn fingu sína sjálvkenslu heima við hús og í einum gerandisdegi, sum broyttist lítið og einki. Í dag skulu børn og

ung leita hana fram og skapa sína egnu burtur úr øllum tí fjølbroytta og skiftandi, sum er uttan um tey. Tað gevur teimum sterkastu og dugnaligastu eina mentunarliga sjálvstøðu, væl størri enn fyrr. Men ikki eru tað øll, sum duga at fóta sær og finna seg til rættis. Tí er baksíðan av samfelagsligu broytingunum eitt ráðaloysi, sum kann enda í harðskapi, misnýtslu og lógarbrotum.

## *Føroysk ungdómsmentan*

Tað verður sagt, at ungdómslívið í Føroyum er øðrvísi enn í øðrum Norðurlondum. Í øllum førum fara tey í Havn seinni í býin enn aðrastaðni, og hjá summum verður dagur og nátt vend við. Kanska tað gevur Havnini meira lív, enn aðrir býir um somu støðd hava, og hetta er ein mentan fyri seg, sum kann hava sínar avbjóðingar og síni egnu virði. Men hjá foreldrum og tilkomnum at síggja 13-14 ára gomul vála miðleyst í gøtunum er ikki altíð hugaligt, og upptakið av fløskuknúsi og burturkasti eftir eina veitslunátt kann vera øgiligt. Ringasti óttin er kortini náttarlív og bilkoyring saman, og talið av vanlukkum er tað samfelagsskylda at minka.



## *Margarinfabrikkin*

Margarinfabrikkin er frítíðarhús, har børn og ung úr øllum býnum kunnu koma, og húsið er ætlað teimum, sum vanliga ikki fara aðrastaðni. Her kunnu tey lurta eftir tónleiki, gera diskotek, spæla billiard og telduspøl. Tey kunnu vera meira óbindandi saman, men hava tey hug, kunna tey tosa opið við vaksið fólk, sum stendur fyri húsinum. Einir 70 ungdómar vitja meira og minni fast hvørja viku, seinnapartar og um kvøldarnar. Dagligi leiðarin hevur tvey hjálparfólk aftur at sær hálva tíð, men arbeiðið í húsinum er framvegis á royndarstigi og hevur ikki fasta játtan.

### *Ynski og ætlanir*

*Tað er ringt at siga, hvussu tað skal bera til at skipa tað óskipaða. Her man tað framvegis vera foreldrini, sum hava ta fremstu ábyrgdina, men kommunan eigur at hugsa um bústaðarøkini at fáa tey so fjølbroytt og livandi sum gjørligt. Virksemi, sum kann fara fram í vanligum húsum, eigur at vera loyvt, og arbeiðspláss, sum ikki dálka ella gera gang, eiga at vera, so at býlingarnir ikki standa tómir um dagin. Meira kann verða hugsað um nærumhvørvið hjá børnunum, og møguleikar eiga at vera at kunna brúka felagshús, skúlar, skúlagarðar og útiøki til sjálvskipað spæl eftir skúlatíð.*

*Margarinfabrikkin eigur at gerast eitt rættiligt virkishús, har øll ung hava hug at koma at stytta sær stundir. Harðskapur eigur at fyribyrgjast við tiltøkum og upplýsing í skúlanum, og í samstarvinum millum skúla, heim og umsiting.*

*Tórshavnar kommuna hevur gjørt eitt eldraálit. Eitt gott úrslit av tí er Tilhaldið í Tórsgøtu. Tað verður skotið upp, at nevnd ella arbeiðsbólkur verður settur at viðgera barnamentanina í kommununi og gera álit at leggja fyri býráðið.*





# TÓNLEIKUR

## *Kvøðing og sangur*

Søguliga er kvøðingin dýrasti føroyski tónleikaarvurin, og saman við dansinum eru kvæðini mentunargripur, sum ger Føroyar einastandandi í heiminum. Í nýggjari tíð hevur ikki altíð staðið væl til, og mótstøðan móti føroyskum dansi hevur verið stór. Men dansifeløg, lærarar og áhugaðir einstaklingar hava hildið hesi mentan uppi, og kvøðing og føroyskur dansur er nú kravt undirvísingarevni í fólkaskúlanum. Fleiri ung eru uppií nú, og í seinastuni hava vit sæð dømi um nýyrkt kvæði, har til dømis eisini nýggja teldutøknin verður nevnd. Kanska er tíðin nú komin at hava almennan føroyskan dans í Sjónleikarhúsinum hvørt mánakvøld um veturin.

Er kvøðingin søguliga støðið, so kann sangurin sigast at vera samanbindingin til nútímans tónleik. Tað verður sagt, at føroyingar syngja meiri enn onnur, og stundum undrast gestir úr grannalondum, tá teir her hoyra fólk syngja norðurlendskar vísur ella sangir, sum tey sjálv hava gloymt. Kórini eru nógv,

og at syngja saman hevur stóran týdning mentunarliga og sosialt, so sum kanska best sæst á ólavsøkusanginum, bæði tí fyriskipaða kórsanginum og tí stóra felagssanginum um kvøldið ólavsøkudag.

## *Ljóðføristónleikur*

Føroyskur tónleikur var sangurin og kvøðingin, og næstan eingi ljóðføri vóru uttan í Havn. Jens Christian Svabo, sum hevði lært at spæla violin, meðan hann las í Keypmannahavn, var fastur spælimaður „paa fornemme Bryllupper og Lystigheder i Thorshavn" seinast í 1700-árunum.

Rættilig gongd kom kortini ikki á fyrr enn eina øld seinni, tá ið bakar Hansen var komin til Føroya og hevði stovnað sínar tónleikabólkar og orkestur. Um hann sigur William Heinesen, at hann dugdi at spæla øll ljóðføri, sum vóru til, umframt fleiri av teimum, sum ikki vóru uppfunnin enn. Tað varð sagt um hann, at hevði hann havt fleiri armar og munnar, so hevði hann kunnað verið eitt heilt symfoniorkestur einasamallur maður. Í 1902 stovnar hann hornorkestrið „Tjaldur" sum seinni verður til Havnar Hornorkestur, og í 1922, tvey ár áðrenn Bakar Hansen doyr, stovna takksamir næmingar GHM, Georg Hansens Minde.

Rútmuorkestur spældi í 20-árunum, og jazzbandastreingirnir hoyrdust tá á fyrsta sinni. Tann andaligi tónleikurin tók seg fram í samkomunum og í Frelsunarherinum, og í gøtumyndini og býarlívinum gjørdust útimøtini við tónleiki ein týðandi táttur.



## *Tórshavnar Musikkskúli*

Fyrsta skipaða almenna ella hálvalmenna frálæran kom við Tórshavnar Musikkskúla, ið varð stovnaður í 1942 við tí endamáli at læra upp ungar og gávaðar tónleikarar til samanspæl og soleiðis fáa eitt kamarorkestur í høvuðsstaðnum á

einum hægri tónleikaligum støði. Tórshavnar Musikkskúli hevur síðani 1985 verið kommunalur skúli, sum á breiðum grundarlagi hevur til endamáls at vekja ans fyri tónleiki, at menna musikalsku gávur næminganna og at leggja støðið undir eitt ríkt musikklív.



Og tað kann sigast, at Havnin í dag hevur eitt fjølbroytt og ríkt musikklív, so at tónleikurin ivaleyst er tann listagreinin, har mest hendir og største orkan finst, ikki minst í áhuganum og nýroyndunum hjá teimum ungu. Í dag hoyrist livandi tónleikur allastaðni, tað er gerandisverk at spæla uppá og ikki longur fyri tey fáu. Men júst hesin stóri áhugin er eisini vorðin størsti trupulleikin hjá musikkskúlanum, tí bíðilistarnir eru langir, og umstøður eru ikki at bjóða øllum frálæru, sum hava hugin at spæla. Tørvur er á fleiri tímum og fleiri lærarum, ikki minst er saknur á útbúnum sanglærarum til miðvíst at venja og menna røddir.

Skúlin undirvísir í 24 ymiskum ljóðførum umframt í musikkteori, hoyrilæru og orkesturspæli. Skúlin á Frúutrøð hevur tann klassiska tónleikin, í Skansastova er tann rútmiski tónleikurin. Umleið 500 næmingar eru og 22 lærarar. Næmingatalið skal samanberast við talið á teimum umleið 900, sum eru uppskrivað men ikki sleppa inn fyri plásstroti.

### *Yrkistónleikur*

Tey seinnu árini hava nógvir tónleikarar fingið yrkisútbúgving. Hetta hevur hækkað støðið, so sum best sæst á konsertum og framførslum, ikki minst teimum hjá Føroya Symfoniorkestri. Sum er, mugu tey yrkislærdu undirvísa fyri at kunna liva. Smáir møguleikar eru at fáa tíð og umstøður at menna seg sjálv tónleikaliga og listarliga, og tað kenst ofta sum ein eyðmýkjandi biddaragongd til stovnar, fyritøkur og myndugleikar, hvørja ferð ein konsert ella annað tiltak skal fyriskipast.

Tí er vandi fyri, at tey yrkislærdu støðast ikki, og fleiri dømi eru um ungar tónleikarar, ið ikki koma aftur eftir lokna

útbúgving ella rýma aftur av landinum, tá ið tey hava verið her eina tíð. Av tí sama er trot á lærarum, serliga tykist saknur at vera á yrkislærdum sanglærarum.

## *Spælistøð*

Góð konserthøli eru í býnum, men hesi høli er ikki altíð tøk og verða nýtt til mong onnur endamál. Saknur er á hølum, sum burturav kunnu brúkast til venjingar og samanspæl, og saknur er á veruligum spælistøðum. Eitt spælistað er hús ella høli við dagligari leiðslu og skiftandi skrá, har fólk kunnu koma meira óbindandi enn til almennar konsertir og hoyra góðan tónleik. Eitt spælistað krevur hugnaligt umhvørvi fyri áhoyraran og skal liggja væl fyri miðskeiðis í býnum. Tað er arbeiðspláss hjá tónleikarum ella bólkum, sum eina tíð kanska kundu spælt hvør sítt kvøld í viku. Spælistaðið kundi skipað fyri samstarvi við matstovur og kaffistovur í býnum, hópur av góðum tónlistafólkum eru tøk og bíða bara eftir at verða boðsend at spæla. Spælistaðið er eitt vakstrarhús fyri tónleik og aðrastaðni ein partur av vanliga býarlívinum.



## *Ynski og ætlanir*

*Teir longu bíðilistarnir geva eina mynd av tí stóra og breiða áhuganum fyri tónleiki. Børn eiga at byrja at spæla 5-6 ára gomul, men noyðast ofta, sum nú er, at bíða til tey verða 10 ella 11. Tí eigur at verða gjørt eitt miðvíst arbeiði at útbyggja tilboðini í musikkskúlanum, ikki minst í klaverundirvísingini, har bíðilistin er longstur.*

*Lærararnir eiga at fáa umstøður at kunna menna seg listaliga. Hetta kundi verið gjørt við at tímatalið í starvssetanini verður býtt sundur, so at ein partur er undirvísing, meðan annar partur er samanspæl, tónasmíð, venjingar o.a. Musikkskúlin saknar høli hjá skúlanum at ráða yvir til samanspæl og vísir á økið á Frúutrøð millum skúlan og*

*læknaviðtaluhølini. Til rútmiska tónleikin eiga fleiri venjingarhøli at verða, gjørd soleiðis at óljóð ikki nervar grannar. Kommunan eigur at útvega sær ljóðútbúnað, sum er léttur at seta upp og flyta, tá ið ein bólkur ella eitt kór skal framføra tónleik fyri øðrum ymsa staðni í kommununi.*

*Eitt ella fleiri spælistøð eiga at vera miðskeiðis í býnum, har lætt er at koma á gátt bæði hjá vanligum havnarfólki og hjá gestum, sum koma til býin. Umframt eitt virkið og livandi tónleikalív hevði tað kunnað givið økt virksemi í miðbýnum og verið gott tilboð til ferðafólk.*

*Samanspæl og samstarv millum skúlarnar í kommununi eigur at mennast til dømis við árligum felags skúlastevnum, og kommunan kundi hjálpt við at fyrireikað og fyriskipað tónleikastevnur og konsertir, so at teir virknu tónleikararnir kundu savnað seg meira um tónleikin og sloppið undan tíðarkrevjandi umsiting. Yvirhøvur eigur samstarvið at mennast, eisini millum listagreinirnar, so at tónleikur, orð, rørsla og myndir kunnu bindast saman í størri heildir.*

*Havnar Hornorkestur hevur vánaligar húsaumstøður. Umframt at hjálpa við hølum og umsiting kundi býráðið kveikt nýroyndir, og hon eigur at umbiðja nýggj verk at framføra í sambandi við stevnur, hátíðarhald og onnur serstøk høvi.*



# MYNDLIST

## *Søga og umhvørvi*

Eftir seinna heimsbardaga vaks fram eitt myndlistarligt umhvørvi í Havn. Fyrsta ættarlið av listafólki, ið verið høvdu í Keypmannahavn og fingið útbúgving á Kunstakademinum, vóru komin heimaftur eftir krígslok og vildu liva sum listafólk burturav. „Vit hildu okkum hava stórverk at gera í Føroyum“, sum Janus Kamban tók til. Og hóast umstøðurnar mangan vóru trongar, hevur alsamt verið gróður í myndlistini hesi fimti árini.

Hóast summi listafólk hava valt at búseta seg uttanlands, tí viðurskiftini eru trong í Føroyum, so hava vit framvegis eitt listarligt umhvørvi í Havnini, og myndlistin hevur stóran mentanarligan týdning fyri landið. Í mun til fólkatalið eru tey, ið arbeiða fulla tíð sum listafólk, mong her á landi, og sum vit kenna tað úr øðrum londum, hava tey lyndi til at leita saman og hittast, har avbjóðingarnar eru mestar. Hesar umstøður finna tey best í høvuðsstaðnum. Tí er tað sannroynd, at nærum øll myndlistafólk her á landi búgva og arbeiða í Havn.

Listafelag Føroya varð stovnað í Keypmannahavn í 1941 og hevur verið virkið í Havnini síðani krigslok. Almennir stovnar, fyritøkur og einstaklingar gjørdu sítt til, at myndlistafólkini fingu umstøður at arbeiða, hava framsýningar og

selja. Tórshavnar býráð kom inn í myndina av álvara í 1953, tá ið samtykt varð at játta pening til at myndprýða nýggja kommunuskúlan í Havn (William Heinesen, Zacharias Heinesen, Ingálvur av Reyni og Janus Kamban). Hetta man vera fyrsta stóra myndlistauppgáva í Føroya søgu, sum tað almenna hevur staðið fyri, og tað fekk stóran týdning sum fyrimynd fyri onnur, ið sum frá leið fóru at bíleggja listaverk frá føroyskum listafólki.

## *Tórshavnar býráð og myndlist*

Tá ið Eysturskúlin varð bygdur í 1982, varð partur av byggikostnaðinum settur til at skrýða hann við. Úrslitið varð millum annað ein vøkur skúlahøll, ið samstundis er eitt tað besta tónleikahølið í býnum. Spell, at hetta framúr góða hølið seinni gjørdist ítróttarhøll burturav. Síðani eru aðrir bygningar skrýddir, sum býráðið eigur sín lut í, eitt nú Lágargarður, Ellisheimið, Hoyvíkar Skúli og Farstøðin. Býráðið hevur somuleiðis latið seta upp standmyndir ymsastaðni í høvuðsstaðnum. Hesar bíleggingar og keyp av list hava alstóran týdning, bæði sum fíggjarligan og viðurkennandi stuðul. Tey gera, at listafólkini kenna seg vælkomin í Havn.

Býráðið læt grundøki í Viðarlundini, tá ið Listafelagið bygdi Listaskálan í 1969, og býráðið var umboðað í trýmannanevnd, sum stýrdi hesum stovni. Býráðið tók ikki beinleiðis lut í rakstrinum, men helt økið uttan um Listaskálan. Við hesum vóru rættiligar framsýningarumstøður á fyrsta sinni skaptar í Føroyum.

Tá ið stovnurin Alment Føroyskt Listasavn og sjálvsognarstovnurin Listaskálin vórðu tiknir av og í 1989 lagdir saman í nýggja sjálvsognarstovnin Listasavn Føroya, fekk býráðið umboð í nevndina, og býráðið tók dyggan lut í fíggingini, tá ið stóri nýggi framsýningarbygningurin varð reistur. Býráðið læt eisini grundøki til bygningin, ið stóð liðugur í 1993. Grafiskur verkstaður er innrættaður í norðara enda á gamla listaskál-

anum, og yvirhøvur kann sigast, at karmarnir um myndlistina í høvuðsstaðnum nú eru góðir. Umhvørvið er virkið, og við Listasavninum, Smiðjuni í Lítluvík, sum býráðið eigur, og Norðurlandahúsinum er Havnin væl fyri við framsýningarmøguleikum.

Heimavirki eigur at verða havt í huga, og við samtakinum „Hendur og hugflog" tykist miðvís menning at verða komin í arbeiðið við hesari gagnlistini.




### *Arbeiðsumstøður*

Myndlistafólk hava fyrst av øllum brúk fyri rúmligum arbeiðshøli. Hjá myndlistafólki í Havn eru arbeiðsumstøðurnar ymiskar. Summum hevur tað eydnast at at gera egna verkstovu, tá ið tey eru komin upp í árini, men størra partin av virknu árum sínum hava tey havt vánaligar arbeiðsumstøður. Annars royna listafólkini at finna sær okkurt tómt høli, tey kunnu leiga ella læna stytri ella longri tíðarskeið, so sum frægast liggur fyri.

Málarar tykjast hava lættast við at fóta sær í okkara lítla samfelagi, men at vera myndahøggari er ikki lætt. Virknasti og gitnasti myndahøggari okkara er vorðin útiseti burturav. Ein keramikaraverkstaður er í Havn, sum framleiðir og selur gagnlist úr leiri. Grafikarum standa bæði verkstaðurin í Listasavninum og í Tórshavnar Listaskúla í boði.

At kalla einasta tilboð um listaútbúgving í Føroyum er grundútbúgving á byrjanarstigi, ið Tórshavnar Listaskúli og Føroya Fólkaháskúli kunnu bjóða. Listaskúlin varð stovnaður í 1988 í hølum, sum kommunan hevði innrættað til endamálið. Hann var seinni fluttur og hevur tey seinnu árini verið at kallað heimleysur.

## *Ynski og ætlanir*

*Besta hjálp, Tórshavnar kommuna kann veita myndlistafólki í Havn, er at útvega høli til verkstovur, so sum er gjørt, til dømis á Akureyri, ið er býur um somu stødd sum Havnin. Hetta kundi verið ein ella tveir bygningar, eldri pakkhús ella goymslubygningar ella nýggir barakkbygningar. Húsini kundu verið við flytiligum bróstum skilað sundur í einar 3-4 hóskandi verkstovur, 50-60 fermetrar hvør. Listafólkini kundu goldið fyri varma, ljós og nakað av húsaleigu eisini, og hølini kundi staðið listafólkunum í boði eitt ávíst áramál, kanska 3 ár í senn. Tílík íløga hevði gagnað listini í Havn almikið og fyrst og fremst teimum ungu listafólkunum.*

*Stóran týdning hevur tað, at býráðið bíleggur og keypir list. Mælt verður til, at býráðið fær sær køna ráðgeving og við fyrimynd í M. A. Jacobsen-nevndini setur eina listanevnd, ið kann taka støðu til, hvørji listaverk býráðið skal bíleggja ella keypa. Listanevndin skal leggja sær eina við at ganga á framsýningar, ikki minst Várframsýningina, ið serliga er ætlað teimum evnaríkastu av okkara ungu listafólkum, og sum hevur til endamáls at hækka listaliga støðið í Føroyum.*

*Stórar vónir eru til grafiska verkstaðin í Listasavninum. Útgerðin har er framúr góð bæði til pressur og tilfar, og tann gitni litografurin Jan Andersson er leiðari har. Miðað verður eftir at fáa útlendsk listafólk at koma henda vegin at arbeiða á verkstaðnum saman við okkara egnu grafikarum. Tey kunnu tá gjalda fyri at brúka verkstaðin og lata grafikk afturfyri, sum verkstaðurin so kann selja á útlendska markn-aðinum. Besti stuðul verkstaðurin kann fáa, til hann rættiliga kann fóta sær, er at grafikkur verður bílagdur frá honum. Býráðið kundi til dømis bílagt eitt ávíst tal av steinprentum á hvørjum ári at prýða skrivstovur sínar við ella til at brúka sum gávur til viðskiftafólk, gestir og onnur. Býráðið kundi eisini latið prenta listarligar plakatir á verkstaðnum.*

*Skotið verður upp, at Listasavnið setur allan februar mán-*

*að av til tey børn í Havn millum 10 og 12 ár, sum hava hug at koma hvønn dag eftir skúlatíð at tekna, mála og modellera. Býráðið rindar tveimum listafólkum at standa fyri hesum. Deils skulu børnini hvørt í sínum lagi stuðlast at arbeiða við sínum egnu verkum, deils skulu tey arbeiða saman við einari felags verkætlan. Mánaðurin endar við framsýning, ið stendur uppi eina viku, og býráðið letur tríggjar virðislønir fyri tey bestu verkini.*

*Ítøkiliga verður skotið upp, at standmyndin á Glade Hjørn verður flutt niðan í svimjihøllina í Gundadali. Har kundi vatn verið lagt í hana aftur, soleiðis sum upprunaliga varð ætlað. Somuleiðis verður skotið upp, at standmyndin „Móðurmálið“ við gamla landsbókasavnið verður flutt á annað betur hóskandi pláss, kanska á Tinghúsvøllin, so hon kann koma til sín rætt og fólk veruliga síggja hetta listarliga meginverkið í býnum.*




# SJÓNLEIKUR

## *Søguligt yvirlit*

Tann tiltikna Vágsbotnstíðin í seinnu helvt av 1700-árunum var tíð við nógvum arbeiði og góðari vinnu í Havn. Tá vórðu fyrstu Holberg-komediurnar spældar, og síðani vórðu javnan danskir leikir framførdir, vanliga í Fútastovu niðri í Gongini. Fyrstu føroysku leikirnir vórðu spældir í tinghúsinum á føstulávint í 1889, „Veðurføst" eftir Sonnu Helenu Patursson og „Gunnar Havreki" eftir Rasmus Effersøe. Í 1892 varð sonevndi Teatursalurin bygdur upp í Klubban til Den dramatiske Forening i Thorshavn, táverandi sjónleikafelagið í Havn.

Í 1917 varð Havnar Sjónleikarfelag stovnað við tí endamáli „at føra fram sjónleikir á føroyskum máli í so góðum skili sum gjørligt er". Felagið tók stig til at byggja hús til sjónleik burturav, og í 1926 varð Sjónleikarhúsið tikið í nýtslu. Havnar Sjónleikarfelag hevur hesi umleið 80 árini verið miðdepil fyri sjónleikin í Havn og í Føroyum við mongum mætum listamonnum á odda, teirra millum Hans Andrias Djurhuus og William Heinesen.

Í 1960- og 70-árunum var Eyðun Johannessen eftir lokna útbúgving sum sjónleikari í starvi sum leiðari í Sjónleikarhúsinum og sum ráðgevi fyri sjónleik í øllum Føroyum. Sjón-

leikurin blómaði hesa tíðina, og nógv av teimum fólkum, sum tá komu til, mynda framvegis bæði yrkis- og áhugaleikin í Havnini. Eyðun Johannessen fekk stóran týdning fyri sjónleikin, og í 1977 tók hann stig til at stovna yrkisleikbólkin Grímu. Tað var hansara sannroynd, at skuldi støðið á føroyskum sjónleiki mennast, var neyðugt, at leikarar vóru, sum brúktu sína tíð burturav til sjónleik. Bólkurin Gríma, sum virkar undir Leikarafelag Føroya, felagið fyri yrkisleikarar, var heimleysur tey fyrstu árini. Í 1994 játtaði býráðið bólkinum innivist í Margarinfabrikkini, og seinni varð við góðum stuðli frá kommununi mjólkarhøllin í gamla meiarínum umbygd og tikin í nýtslu til sjónleik.

## *Sjónleikurin í dag*

Havnar Sjónleikarfelag er eitt virkið felag, og fólk í øllum aldri hava sína gongd í Sjónleikarhúsinum. Fastir táttir á skránni eru ólavsøkukabarettin og leikhúsjól. Harumframt verður miðað eftir at seta upp ein barnaleik og tveir stórar leikir á hvørjum ári. Tey ungu í felagnum hava tikið seg saman í leikbólkinum Brim. Stórt virksemi er í upplestrarbólkinum, sum verður biðin til nógvar upplestrar á fyritøkum og stovnum.

Leikarafelag Føroya hevur í løtuni 9 yrkisleikarar, sum verða løntir, tá ið teir arbeiða í Grímu. Í ávísum førum eru áhugaleikarar við í framførslunum hjá Grímu, og tá verða teir eisini løntir. Leikpallur Føroya hevur sett Eyðun Johannessen og Jenny Petersen í starv, ávikavíst sum listarligan stjóra og sum fyrisitingarleiðara í Grímu. Sjálvt um húsið og mesta virksemið er í Havn, so eru bæði Gríma og leikpallurin fyri alt landið. Sýningar eru fyri skúlar og barnagarðar um dagin, umframt eru tær almennu kvøldsýningarnar. Gríma skipar eisini fyri øðrum almennum mentanartiltøkum á Meiarínum.

Kvøld- og Ungdómsskúlin hevur í samstarvi við MáF sjónleikarskúla sum part av virksemi sínum og hevur skeið í

sjónleiki við børnum og fyri børn. Tórshavnar kommuna hevur latið MáF innivist í Hans Andriasarhúsi og meginfelagið ger eitt virkið arbeiði, sum hevur týdning fyri sjónleikin í Havn.

## *Áhugaleikur og yrkisleikur*

Tað er umráðandi at hava bæði áhugaleik og yrkisleik. Hjá áhugaleikarum hevur felagslívið, tað at arbeiða saman og taka lut i felags verki, ikki minni týdning enn tað leiklistaliga. Í Føroyum er stórur áhugi fyri at spæla sjónleik, og ofta hava áhugafeløgini framført leiklist á høgum støði. Áhugaleikurin er grundin, sum allur sjónleikur stendur á, og ein yrkisleikari hevur altíð sínar røtur í áhugaleikinum.



Yrkisleikur er starv sum onnur størv, har útbúgving og drúgvar royndir geva tann serstaka førleikan, í hesum førum tann leiklistaliga førleikan. Av tí sama kunnu størri krøv setast yrkisleiki, og yrkisleikur verður fyridømi og gevur íblástur til áhugaleikin. Yrkisleikarar kunnu við sínum royndum í listaliga handverkinum stimbra og vegleiða innan áhugaleikin.

## *Leikframleiðsla*

Áskoðararnir síggja tað, sum verður framført á palli. Men sjónleikur er eisini alt tað, sum krevst av fyrireikingum og venjingum til at samskipa leikritið, pallsmíðið, búnarnar, tónleikin, ljósið og ljóðið. Sjónleikur er ein eind av mongum ymiskum listum og nógvum ymiskum handverki. Vanliga er venjingartíðin 2-3 mánaðir, og vanliga er tað so, at fyri hvørt fólkið á palli eru tvífalt so nógv handan leiktjøldini. So tað er skilligt, at tað kostar at seta leikir upp.

Í yrkisleiki eru umleið 80 % av kostnaðinum lønarútreiðslur, meðan sølan av atgongumerkjum vanliga ber einans millum 10% og 15% av kostnaðinum. Í áhugaleiki er støðan øðrvísi, tí lønir vanliga ikki verða latnar. Tað er tó ein sannroynd, at tað ikki ber til at seta upp áhugaleik í dag, verða ikki

nøkur av teimum luttakandi lønt, og tað er føst skipan nú, at leikstjórar, pallstjórar og aðrir fyriskiparar fáa løn fyri sítt arbeiði. Til tær heilt stóru framførslurnar nærkast kostnaðurin í áhugaleiki tí, sum er í yrkissjónleiki.

Álvarsligi munurin á kostnaði og inntøkum ger fíggingina til tann stóra trupulleikan í sjónleiki. Í eini 20 ár hevur Tórshavnar kommuna latið regluligan rakstrarstuðul til virksemið í Sjónleikarhúsinum, men aðrar inntøkur hava altíð verið neyðugar. Í mong ár komu høvuðsinntøkurnar frá biografi og dansi. Í dag fíggjar Sjónleikarhúsið ein part av rakstrinum við at leiga húsið til onnur endamál. Húsið er nú í góðum standi, og nógv hava hug at sleppa inn, men sjónleikur og annað virksemi forðar hvørt fyri øðrum og fær ikki verið í senn.

## *Ynski og ætlanir*

*Tað er ein veruleiki, at hóast tvey leikhús nú eru í býnum, so hevur Havnin einki fulltíðar, fullnýtt sjónleikahús.*

*Sjónleikarhúsið er við hepnari hjálp frá býráðnum umvælt og í góðum standi, áhugin hjá limunum í sjónleikarfelagnum er livandi og virksemið stórt. Men nógv liggur á limum og nevnd til at útvega inntøkur, og var ikki húsaraksturin so tungur, hevði munandi meira kunnað verið gjørt við tað, sum er endamálið við húsinum og samstundis áhugin hjá limunum, hetta at fyrireika og framføra sjónleik. Ynskið má tí vera, at tað skal bera til, umframt vanliga húsaumsiting, at fáa eina fasta dagliga leiðslu. Hon fæst neyvan í lag uttan at býráðið setur hesa leiðslu, og fyrstani tá kann Sjónleikarhúsið gerast veruliga býarleikhúsið í Havn.*

*Meiaríið liggur ógvuliga væl fyri í miðbýnum. Men húsið kann ikki nýtast, sum tað átti, tí arbeiðið er ikki heilt liðugt, og enn er stórur tørvur á tekniskari útgerð, ljósi, ljóði og innbúgvi av ymiskum slagi. Eisini er plásstrot, sum tað kortini við vælvild frá býráðnum hevði borið til at loyst á*

*lagaligan hátt. Hevði býráðið, sum eigur bygningin, kunnað tryggjað, at tær teknisku húsaumstøðurnar vóru í lagi og annars latið hóskandi rakstrarstuðul, so hevði Havnin fingið eitt hús, sum kundi gjørst ein týðandi partur av einum spennandi miðbýarlívi í høvuðsstaðnum. Tí er tað sjálvsagt, at landið og býurin eiga at arbeiða saman um hetta leikhúsið.*

*Samstarvið millum áhugaleikarar og yrkisleikarar eigur at mennast, tí meira er, sum bindur saman enn skilir. Tann tvístøða og andstøða, sum stundum hevur verið, fer ivaleyst at hvørva sum frá líður, soleiðis at leikhúsini bæði við ymiskari útgerð so sum tólum, klædnagoymslum v.m. kunnu nýtast í felag eftir tørvi í samstarvi við ongum múrum ímillum. Og felags fyri leikararnar, annaðhvørt teir eru í hesum ella hasum bólkinum, er dreymurin um at sleppa frá øllum tí rakstrarliga, sum forðar og darvar, so teir kunnu savna seg um tað eina: At vera sjónleikarar og fáast við sjónleik.*





# BÓKMENTIR OG SKALDSKAPUR

## *Søga og umhvørvi*

Enn stendur Pætursarstova, har ið Jens Christian Svabo búði, hann sum skrivaði stóru Føroya-frásøgnina, tað fyrsta stóra føroyska orðasavnið, og teir fyrstu samanhangandi tekstirnar á føroyskum. Gomlu bókasavnshúsini í Erling Jalls gøtu standa enn. Har hevði amtsskrivarin Jens Davidsen, ið sigst at hava lært at lesa og skriva hjá Jens Christiani Svabo, sett á stovn fyrsta almenna bókasavnið í 1828. Hetta savn gjørdist seinni í tíðini Føroya Landsbókasavn, og fyrsti landsbókavørðurin var Mads Andrias Jacobsen, bókmentamaður og skald, í 11 ár býráðsformaður í Havn, til hann doyði í 1944.

Gamli bókahandil stendur enn, bygdur til tann bókliga Millum- og Realskúlan í 1861. Gamli bókbindarin, faðir at stóra málgranskaranum dr. Jakobsen, keypti í 1916 húsini, sum hava verið bókahús burturav síðani.

Og so eru tað havnarskaldini, Áarstovu-brøðurnir Janus og Hans Andrias Djurhuus og skyldmenninir Jørgen-Frantz Jacobsen og William Heinesen. Allur tann gamli býurin er sum eitt livandi savn av teirra skaldskapi, og tað er teirra verk, sum meira enn nakað annað hevur gjørt Havnina kenda úti í heimi.

Skrivandi fólkið í Havn vóru einstakligar, sum starvaðust

hvørt í sínum lagi. Men eftir seinna bardaga tóku tey seg saman, teir fyrstu bókadagarnir vórðu hildnir í Sjónleikarhúsinum við framløgu og upplestri úr nýggjastu bókunum, og í 1957 varð rithøvundafelagið stovnað í hølinum, sum síðani hevur verið kallað Parnassið eftir hesum tilburði.

Rithøvundafelagið skeyt upp, og býráðið samtykti, at seta á stovn árligu bókmentaheiðurslønirnar til minnis um M. A. Jacobsen. Tær hava verið latnar á hvørjum ári síðani 1960, tó við einum gloppi í tíðarskeiðinum 1966-72. Fyri rithøvundar hevur tað havt nógv at siga at fáa almenna viðurkenning fyri eitt mangan ótakksamt stríð, og Havnin hevur fingið góða umtalu og virðing frá øðrum sum einasta kommuna í landinum at vísa ítøkiligan áhuga fyri mentan og list.

## *Bøkur og bókaútgáva*

Bókasøvnini hava, sum vera man, avgerandi týdning fyri bókmentaliga umhvørvið. Á landsbókasavninum eru umstøður at granska og kanna nærri skjøl og tilfar, ið hava við bøkur at gera, handrit, ummæli, viðgerðir. Men størsta dagliga týdningin fyri borgararnar í kommununi hevur býarbókasavnið, soleiðis sum sæst aftur á tølunum fyri útláni og vitjanum. Býarbókasavnið er soleiðis fyri í býnum, at tað er lætt at gera sær ørindi hagar, tá ið onnur ørindi eru í miðbýnum, og natúrligt er at ganga inn á gólvið at lesa bløðini, kunna seg um nýggjar bøkur og leita eftir upplýsingum. Á henda hátt verður býarbókasavnið eitt slag av óformligum savningarstaði í býnum. Serliga virðismikið er tað, at barnabókasavnið er her, og at børn og ung ganga út og inn og kenna seg væl á bókasavninum. Eisini skúlabókasøvnini hava fingið vaksandi týdning tey seinnu árini.

Fleiri og fleiri føroyskar bøkur koma út, og ein vaksandi partur av bókunum verður lagdur til rættis og framleiddur í Føroyum, størsti parturin av teimum í Havn. Eingin onnur føroysk vinnugrein man hava so nógvar nýggjar vørur at vísa

fram á hvørjum ári, og tað er samantalt ikki lítið av arbeiðsplássum, sum eru knýtt aftur at bókunum, frá bókavørðum, granskarum og lærarum til fyrisiting, reprovirki, prentsmiðjur, bókbindarar og fólk í bókahandlum.

## *Arbeiðskor hjá rithøvundum*

Tað er sjálvsagt, at tey sum starvast á hesum arbeiðsplássum fáa løn fyri sítt arbeiðið. Einasti, sum ikki kann vænta sær vanliga løn, er høvundurin, hann ella hon, sum er grundarlagið undir øllum virkseminum í teimum seinnu liðunum. Tvørturímóti noyðist høvundurin mangan sjálvur at standa fyri útgávuni, at finna fígging og seta seg í skuld, skal bókin kunna gevast út. Og við tí avmarkaða talinum, sum er á keyparum í okkara landi, veit hann næstan við vissu, at hann kann vænta sær lítið annað enn rokningar umframt pakkar við óseldum bókum í kjallaranum ella undir væðingini.

Soleiðis sum umstøðurnar eru, má ein høvundur fyrst hava vanligt arbeiði at kunna liva fyri. Familjulívið krevur sítt, og ofta er hann virkin í felagsskapum og samfelagslívi. Tá verður lítið eftir av tíð til at gera tað, hann kanska átti at gjørt fyrst av øllum: At arbeitt við orðum og hildið føroyskum máli og føroyskum kenslum livandi. Veruleiki er tað, so sum norðurlendska rithøvundaráðið hevur gjørt vart við, at sammett við møguleikarnar, sum eru aðrastaðni, hava føroyskir rithøvundar truplastu arbeiðskor í Norðurlondum, og ringast er hetta fyri nýggjar og ungar rithøvundar.



## *Ynski og ætlanir*

> *Fremsta ynskið hjá rithøvundum er at kunna fáa arbeiðsfrið eitt hóskandi tíðarskeið, meðan verk er í gerð. Í hesum sambandi verður ofta víst á tað, sum verður gjørt í Íslandi. Har verður íslendska málið mett at vera sjálvt støðið undir allari aðrari mentan í landinum, og skal málið haldast livandi og*

*mennast í einum samfelagi, sum broytist alla tíðina og liggur undir dagligari ávirkan frá nógv størri málum og mentanum, so mugu rithøvundar og skald hava góðar umstøður at gera sítt arbeiði.*

*Tí eru í Íslandi í løtuni 460 mánaðarlønir árliga settar til rithøvundar at kunna skriva fyri land sítt, sum har verður sagt, og hetta talið veksur. Hesar starvslønir eru býttar sundur í 6-mánaðarskeið, 1-áraskeið og 3-áraskeið. Herumframt hava Reykjavík og Akureyri egnar skipanir við virðislønum og sømdarveitingum til listafólk.*

*Rithøvundar hava leingi gjørt vart við, at teirra verk áttu at verið vard á sama hátt, sum ritverk í øðrum londum. Avtalur eru nú fyri nýtslu av ljósritum í skúlunum, men galdandi lóg um upphavsrætt er danska lógin frá 1961. Heilt aðrar lógir eru á hesum øki í dag, nú nútímans tøknin hevur broytt allar fyritreytir fyri endurnýtslu og viðgerð av teksti og øðrum listaligum verki. Aftan á fyrireikingar í fleiri ár, sær nú út til, at landsstýrið fer at leggja endaligt uppskot um nýggja upphavsrættindalóg fyri tingið.*

*Havnin er framvegis miðdepilin í føroyskum bókmentum, soleiðis sum hon var tað, tá ið Jens Christian Svabo búði í Pætursarstovu. Nú William Heinesen, føddur í grannahúsunum og heiðursborgari í sínum føðibýi, er fyltur 100 ár, kundi verið hóskandi hjá býnum at gjørt vart við hetta á serstakan hátt, sí tilmæli seinast í hesum áliti.*



# SØVN OG STOVNAR

## *Felags minni, felags mentan*

Søvn eru landsins minni og støðið undir dagsins mentan. Øll meginsøvnini í Føroyum eru í Havn. Tey verða fíggjað og rikin eftir játtan á løgtingsins fíggjarlóg og eru almennir stovnar, øll uttan Listasavn Føroya, sum er sjálvsognarstovnur, tó verður raksturin fíggjaður av tí almenna.

Tórshavnar kommuna rekur býarbókasavnið, men hevur annars einki beinleiðis við viðurskiftini hjá søvnunum í býnum at gera. Men tann parturin av virkseminum, sum hevur eitt andlit út móti brúkarunum, framsýningar, lesistovur og tílíkt hjá Føroya Fornminnissavni, Føroya Náttúrugripasavni og Jarðfrøðisavni, Føroya Landsbókasavni, Føroya Landsskjalasavni og Listasavni Føroya, er kortini ein týðandi partur av tí breiða mentanartilboði, sum høvuðsstaðurin kann bjóða, og á søvnini leita mong ferðafólk, sum koma til landið. Býráðið eigur tí at hava áhuga fyri, hvussu hesi mentanartilboð best koma til sín rætt.

Aftur at søvnunum kemur Norðurlandahúsið sum virkin mentunarstovnur. Hann er fyri allar Føroyar, men virksemið

er av natúrligum grundum mest í høvuðsstaðnum, og húsið er blivið ein mentunarmiðdepil í býnum. Hann verður næstan allur fíggjaður av Norðurlondum, hóast meginparturin av virkseminum er føroyskur. Her er ein gáva, sum óivað sleppur føroyskum myndugleikum undan mentanarligum skyldum, ið annars høvdu verið. Tað hevði verið áhugavert at gjørt upp tað virðið, sum húsið hevur fyri býin og sagt sum so: *Býráðið í Havn vil ikki lata minni enn tað sama til mentanina í býnum.*

Umstøður eru ikki her at viðgera hesi søvn og stovnar hvørt sær. Men nakrir teirra hava serstakan almennan áhuga fyri býin:

### *Føroya Fornminnissavn*

Tað stóra økið, sum Fornminnissavnið hevur fingið til nýtslu av innangarðsjørðini hjá Hoyvíksgarði: Hoyvíkin, Byrgistangi og Kýrdalur, er eitt av virðismestu fríøkjunum í kommununi. Savnið hevur arbeitt í fleiri ár við at seta tey gomlu bóndahúsini í stand, somuleiðis húsini uttanum, ið hoyra til garðin, og komið er langt ávegis at skapa eitt einastandandi umhvørvi, ið kann lýsa eina gamla bygd og gamla bygging. Arbeitt verður við fornum føroyskum húsdýrum, og partur av árinum verður arbeitt við tøting og øðrum fornum handverki. Um stutta tíð verður ein jarnsmiðja tøk, har tað gamla smiðjuhandverkið kann varðveitast.

Í einum høvuðsstaði eigur at vera eitt rættiligt tjóðsavn, ið lýsir tjóðarinnar søgu. Tilvildarliga loysnin, sum nú er funnin, at innrætta framsýning í einum fyrrverandi goymslubygningi millum aðrar tilvildarligar goymslu- og handilsbygningar er ikki virðilig fyri landið og ikki nøktandi fyri høvuðsstaðin.

*Mælt verður til, at býráðið i sambandi við býarætlan sína og við ásetingum í byggisamtyktini tryggjar lendið og stuðlar upprunaligu ætlanini at byggja framsýningarhús til tjóðsavn okkara í Kýrdali, beint oman fyri garðarnar í Hoyvík.*

## *Føroya Náttúrugripasavn*

Náttúrugripasavnið hevur innrættað framsýningar sínar í gomlu bátahøllini, sum í 1952 varð bygd á Desartrøð og longu tá mett sum bara ein fyribilsloysn. Húsini eru sera eldfim og lúka neyvan øll trygarkrøv. Tey áttu at verið tikin niður, tí tey eru óhóskandi sum framsýningarhús.

*Mælt verður til, at áðurnevndi savnsbygningur í Kýrdali verður skipaður sum eitt heildarsavn, har framsýningarnar fevna bæði um fornfrøði, søgu, náttúrufrøði og jarðfrøði. Í øðrum londum, eitt nú í Álandi, eru royndirnar av slíkari heildarloysn sera góðar.*

## *Tórshavnar Býarsavn*

Havnin hevur sína serliga forvitnisligu søgu, og eigur hon, so sum verður gjørt í øllum øðrum høvuðsstøðum, at verða lýst á fastari framsýning. Býarsavnið finst á pappírinum, og talan hevur verið um at innrætta ávíst hús til savnið.

*Mælt verður til at umhugsað málið av nýggjum og taka upp samband við Føroya Fornminnissavn við tí endamáli, at Tórshavnar Býarsavn fær serstaka deild í komandi savnsbyggingini í Kýrdali. Býarsavnið kann hava sítt egna framsýningarøki, men býráðið og landið eiga at samstarva um granskingar, goymslu- og varðveitingarpartin.*

*Samstundis verður mælt til, at farið verður sum skjótast undir skráseting og miðvísa ætlan fyri býarsavnið, og at yrkislært fólk fær ábyrgdina av arbeiðinum.*

At enda verður gjørt vart við tann nógv vaksandi áhugan fyri ættargransking og siðsøgu yvirhøvur. Føroya Landsskjalasavn hevur ikki góðar húsaumstøður, men hevur møguleikar at gerast ein virkin miðdepil fyri gransking av býarsøgu og ættarsøgu.





# ANNAÐ

Mentan er allastaðni, í smáum og stórum, og ikki ber til at lýsa øll tey ymisku mál og øki, sum kundu verið nevnd í verkevni sum hesum. Tó verða her at enda tiknir nakrir fáir tættir fram, sum kunnu leggjast afturat teimum høvuðsevnum, ið eru umtalað frammanfyri.

## *Bygging*

Fólk fara, men hús standa, og eingin søga talar á okkum so týðiliga og beinleiðis í gerandisdegnum sum húsasøgan. Í gamla býnum er ein ríkur arvur, sum ger Havnina einastandandi í heiminum og sermerkt fram um aðrar býir. Tað ber til at ganga teinin av Tinganesi niðan á Vaglið eftir stuttari løtu, men kortini er her ein søga, sum er meira enn 1000 ára gomul, og tað er sum eitt undur, at sporini frá farnum øldunum síggjast enn, og at eldur ella mannahond ikki hava oytt tað burtur. Gamli býurin er tað virðismesta, Havnin eigur, og tað er ein støðug skylda at varðveita tað rætt og bøta um við kunnleika og kønum hondum.

Men Havnin er annað enn húsini úti á Reyni og uttan um Eystaruvág. Ein virðismikil bygningsarvur er eisini í býlingunum, sum vórðu bygdir seinni niðan við Tinghúsvegin, úti í Bø og í Rættará. Býráðið eigur at gera ætlan fyri hesi øki, so tað besta kann varðveitast, og soleiðis at stuðulsmøguleikar verða her á sama hátt sum hjá teimum í gamla býnum, tá ið tey vilja bøta um og seta síni hús i góðan stand. Arbeiðið hjá kommununi í gamla býnum hevur gjørt mun, og tíðin er nú komin at halda fram við hesum arbeiði og her hugsa um teir bygningar, sum hava serstakan týdning, pakkhúsini, gamla hospitalið, húsini í Vágsbotni og onnur.

*Mælt verður til at gera eina miðvísa skráseting av øllum húsum, sum hava byggisøguliga og byggilistarligan týdning í kommununi, soleiðis sum nú verður gjørt víða um í Norðurlondum.*

*Húsini verða standandi, og í nýbygging, har kommunan ger ætlan ella stendur fyri, eigur tað at vera eitt endamál at skipa so fyri, at tað, sum nú verður bygt, skal kunna gleða okkara eftirkomarar um 100 ella 200 ár.*

## *Livandi myndir*



Einki er sum at síggja myndir frá barnaárum ella frá undanfarnum ættarliðum. *Kommunan eigur at festa býarsøguna á livandi myndir við jøvnum millumbili, kanska einaferð 25. hvørt ár, og hví ikki byrja miðvíst í árinum 2000?*

Annað er, at livandi myndir, tað at ganga í biograf, síggja filmar og video og at arbeiða við hesum miðli, er partur av dagsins býarmentan, og býráðið kann tryggja, at tað framhaldandi verður so. Einasta biohøllin, Havnar Bio, eigur natúrliga at verða nýtt í undirvísingini í filmi, sum nýggja fólkaskúlalógin ásetur. Tað kundi verið gjørt í skipan, kanska kallað skúlabio, har biohøllin verður tøk hjá skúlunum í skúlatíðini á sama hátt sum gjørt verður í Noregi, har kommunurnar eiga

flestu biohøllirnar og hava gjørt tær til rættiligar mentanardeplar.

Sum frá líður verða upptøkutøl ódýrari og lættari at handfara. Góðskan verður harafturat á einum tílíkum tøkniligum støði, at tey bestu úrslitini kunnu nýtast og sendast í sjónvarpi.

*Eitt samstarv millum skúlarnar og Sjónvarp Føroya kundi verið skipað við tí endamáli undir kønari leiðslu at fremja kynstrið at siga søgur í myndum.*

*Rás Tórshavn var ivaleyst hent tiltak hjá býráðnum í síni tíð, men tað er ein spurningur, um tað framvegis er ein kommunal uppgáva fyri sínar borgarar at velja nakrar fáar útlendskar sendingar burtur úr tí ørgrynnu av møguleikum, sum framkomna tøknin gevur.*

## Telda og tøkni

At handfara teldu á skilagóðan hátt er ein tann besta barlastin at geva børnum og ungum í dagsins samfelagi. Teldan er til og verður verandi, og hon mennist so skjótt, at tey sum ikki taka við henni gerast eftirbátar. Tað ræður tí um at skipa so fyri, at teldan verður eitt natúrligt amboð hjá nógvum og ikki eitt gandatól hjá summum. Skúlarnir eiga at fáa samsvarandi útgerð, og býarbókasavnið og aðrir tænastustovnar eiga at vera so væl útgjørdir, at brúkarnir sleppa lættliga framat.

*Alnetið eigur at vera lætt at koma til og ódýrt at brúka hjá øllum. Tað eigur at verða kannað, hvussu býlingar undir einum kunnu fáa ódýra atgongd til netið.*

*Býráðið, ella kanska býarbókasavnið, átti at havt ein dátustovn fyri kvæðini, eitt stað á netinum, har øll føroysk kvæði vóru tøk og kundu verið lisin og skrivað út. Heimasíðan hjá býráðnum eigur støðugt at verða dagførd, og gjøgnum heimasíðuna skal bera til hjá borgarum at koma á tal sínámillum og við býráðið.*

## *Tiltøk tvørtur um mark*

Samstarv millum bólkar og feløg hevur serliga stóran týdning í samfeløgum við avmarkaðum fólkatali. Her skal verða víst á eitt dømi, sum hevur tikið seg fram serliga í Noregi og sum er áhugavert at umhugsa í komandi mentanarstarvi hjá kommununi.

Trondheim kommunale musikk- og kulturskole er vorðin fyrimyndin hjá nógvum øðrum kommunum, og hugskotið er at seta tær ymisku listirnar saman í eina heild. Tónleikurin skal ikki standa einsamallur, men lærast og nýtast í einum breiðum skapandi umhvørvi, har samstundis verður undirvíst í øðrum musiskum greinum so sum dansi, leiklist og myndlist.

> *Ein tílíkur mentaskúli verður ikki gjørdur eftir einum degi, men málið kann reisast og setast við sum ein hugsan um framtíðar møguleikar. Tórshavnar býráð kann ganga á odda og seta øki av til endamálið.*

Í skrivi til arbeiðsbólkin hevur Ólavur Hátún sett fram sína hugsan um ein mentaskúla í høvuðsstaðnum, og hann vísir á økið sunnan fyri viðarlundina millum Hoydalsveg og Varðagøtu. Haðani er stutt oman til Sjónleikarhúsið, Kommmunuskúlan og Santa Frans Skúla við høllum og hølum, sum kundu hýst pørtum av virkseminum. Norðanfyri er Listasavnið, stadionøkið, Norðurlandahúsið og Útvarpshúsið. Á hesum stovnum eru longu umstøður og útgerð, sum ein størri skapandi felagsskapur kundi nýtt, bæði meðan skúlin var í gerð og seinni.



# UPPSKOT OG TILMÆLI

Arbeiðsbólkurin metir frágreiðing sína vera eitt grundarlag hjá býráðnum til at kunna gera eina virkisætlan, sum raðfestir tey ymisku mentanartiltøkini. Arbeiðsbólkurin vísir til niðurstøðurnar í teimum einstøku pørtunum í hesum áliti og skal at enda taka fram nakrar teirra saman við beinleiðis tilmælum.



### *Býarsøga*

Býarsøgan er grundarlagið sjálvt fyri at kunna skilja dagsins samfelag, dagsins mentan og tey fólk, sum nú liva og virka í býnum. Havnin er søguríkur býur við mongum sporum av lívi í meira enn 1000 ár, men enn er eingin samanfatandi og neyv býarsøga skrivað.

Húsasøgan er serligur partur av hesi felags søgu. Gamli býurin hevur skipan, sum kann verja og varðveita hann, men onnur hús og aðrir bygningar eru, sum hava stórt søguligt virði, men eru ikki undir somu vernd.

*Arbeiðsbólkurin mælir til, at býráðið letur tað upp í hendurnar á kønum fólki at skriva* ***Tórshavnar søgu*** *frá landnámi til okkara dagar, har eisini nýggjasta býarsøgan er við og greiðir frá teimum stórbroytingum, ið eru farnar fram tey seinastu ættarliðini. Harumframt, at tað tilfarið um* ***gamla býin****, sum býararkitekturin saman við fornminnissavninum hevur gjørt við í uppmátingum, tekningum og skjølum, verður savnað og givið út. Arbeiðsbólkurin mælir til, at* ***býarsavn*** *verður fyrireikað við serkønum fólki at standa fyri inn-*

*savning, skráseting og skipan, hetta í samstarvi við Føroya Fornminnissavn, og at* ***hús og býlingar*** *við serstøkum søguligum og byggisøguligum virði verða skrásettir í miðvísari ætlan og koma undir stuðuls- og verndarskipan. Mælt verður til á hvørjum ári at lata* ***heiðursbræv*** *fyri góða bygging og urtagarðsrøkt.*

## *Høvuðsstaður og fyrisiting*

Býurin dregur, hetta sæst allastaðni hesi árini og eisini hjá okkum. Meira og meira verður tað greitt, at sum útbúgvingarstøðið og kunningarstøðið í samfelagnum hækkar, so leita fólk hagar, ið tey bestu tilboðini eru fyri fjølbroyttum felagsskapi, virknum samskifti, góðum frítíðarmøguleikum og persónligum avbjóðingum.

Tí fara mentamálini at vaksa í tali og í týdningi, og við nýskipan í umsitingini við trivnaðardeild sum einari av trimum høvuðsdeildum hevur Tórshavnar kommuna gjørt greitt, at hesin parturin av felagsskapinum skal mennast. Somuleiðis er setanin av hesum arbeiðsbólki í sjálvum sær ein váttan, at býráðið ætlar at leggja dent á mentamál í framtíðini.

*Arbeiðsbólkurin mælir til, at Tórshavnar kommuna styrkir sín førleika at kunna* ***skipa fyri tiltøkum sjálv*** *og at* ***samskipa tiltøk hjá øðrum****. Kunningin um kommununa sum høvuðsstað og heimstað hevur í hesum sambandi stóran týdning, og tann tænastan, sum kunningarstovan veitir, eigur at útbyggjast í tøttum samstarvi við býarumsitingina, soleiðis at verkætlanir kunnu leggjast og fremjast, og teir felagsskapir, ið skipa fyri størri árligum tiltøkum, kunnu fáa umsitingarliga hjálp, ið tryggjar at hetta arbeiðið verður støðugt og framhaldandi. Mælt verður til, at* ***samskipari verður settur*** *at leggja til rættis størri býartiltøk og hava um hendi støðugt dagførdan* ***mentunarálmanakka*** *við* ***listahátíð*** *ovarliga á skránni, har allar listagreinar í býnum arbeiða saman í felags*

*tiltaki. Býráðið eigur at **umbiðja listaverk** til serstøk høvi, og á hvørjum ári **ogna sær listaverk** at leggja afturat teimum, býráðið eigur frammanundan.*

## *Skúlasamstarv*



Børnini eru størsta tilfeingið í samfelagnum. Skúlarnir læra børnini at finna inn í tað skipaða samfelagið og skulu geva teimum kunnleikar og førleikar til tað skiftandi samstarvið, sum í dag krevst á øllum økjum. Tí er tað sjálvsagt, at skúlarnir eisini samstarva sínámillum, og tey seinastu árini eru framhaldsskúlarnir í kommununi farnir undir eitt tílíkt samstarv við breytaskipan í 10. flokki. Men samstarvið kann útbyggjast bæði í innihaldi og viðvíkjandi hølum og útgerð.

*Arbeiðsbólkurin mælir til, at skúlarnir á hvørjum ári hava **felags tiltøk**, til dømis eina stevnu fyri føroyskum dansi, felags kórstevnu og felags sjónleikastevnu. Hetta kann samansjóða skúlar og næmingar og geva teimum eina fatan at vera partar av størri og skapandi heild. Til at styrkja ábyrgdina hjá næmingunum fyri nærumhvørvinum verður mælt til at velja **ársins skúlastovu** og geva avvarðandi flokki virðisløn ella heiðursbræv afturfyri. Mælt verður til, at roynd verður gjørd at hava skúlan opnan eftir skúlatíð sum **virkisdepil** í sínum grannalagi, og at **skúlagarðarnir** verða virkin og lokkandi útiøki og spæliøki í býlingunum.*

## *Børn og ung*

Soleiðis sum skúlin leiðir børnini inn í ein skipaðan felagsskap, soleiðis leiða spæl og royndir í frítíðini tey inn í tað óskipaða, har tann einstaki skal royna at finna sína egnu leið. Hesar royndirnar hava stóran týdning fyri menningina, men tær stóru samfelagsbroytingarnar, sum hava verið hetta seinasta ættar-

liðið, ikki minst broytingar í arbeiðslívi og tøkni, tykjast at hava gjørt tey veiku børnini meira einsamøll og óvard.

*Arbeiðsbólkurin mælir til, at býráðið letur gera eitt* ***barnaálit*** *um viðurskifti og mentan hjá børnum og teimum ungu í kommununi. Álitið eigur at verða gjørt í samstarvi við barnaverndarnevndina og á nakað sama hátt sum eldraálitið, ið varð framlagt fyri nøkrum árum síðani.*

## *Høli til virksemi*

Arbeiðsbólkurin hevur hitt hópin av umboðum fyri mentunarlívið í Havn og hevur vitjað felagsskapir og stovnar í býnum. Frammarlaga hjá flestu teirra hevur verið spurningurin um høli og húsaumstøður. Annaðhvørt talan er um undirvísing, ítrótt, tónleik ella sjónleik, so eru hølisviðurskiftini ein afturvendandi trupulleiki hjá nógvum.

Hølistrupulleikarnir eru av ymiskum slagi. Hølini, ið felagsskapirnir hava, kunnu vera í ringum standi, tey kunnu vera ov dýr at leiga ella umsita, ella tey fáast ikki til taks, tá tørvur er á teimum, tí so nógv eru um boðið, ella tey kunnu liggja spjadd og illa fyri, so at eingin heild fæst í virksemið.

Ringast fyri í so máta tykist kvøldskúlin og listaskúlin at vera, tann mentanarstovnur, ið vendir sær til flest fólk í kommununi, tá ið vit ikki hugsa um ítrótt og barnaskúla. Heldur ikki býarbókasavnið hevur nóg góðar umstøður, og kunningarstovan hevur ikki enn funnið eina varandi húsaloysn.

*Arbeiðsbólkurin mælir til, at kommunan ger eina* ***raðfesta arbeiðsætlan,*** *sum kann útvega hesum stovnum nútíðarhóskandi høli innan eitt ávíst áramál, til dømis tey næstu 10 árini. Bólkurin ásannar, at kommunan kann ikki útvega høli til øll ynski, sum koma, men mælir til, at býráðið framhaldandi er lagaligt og vil hjálpa, tá ið tørvurin er væl*

*grundaður, og umsøkjarar hava víst í verki, at álvari er aftan fyri ætlanirnar.*

### *Livandi miðbýur*

Arbeiðsbólkurin vísur á, at kommunan eigur nógv hús og nógvar ognir í sjálvum hjartanum í býnum. Eitt virkið mentunarlív er um at taka seg upp fram við Tórsgøtu, og bólkurin heldur tað vera rætt at hugsa sær, at hetta virksemið mennist so hvørt, og at umhvørvið her, sum frá líður, gerst listaligi og mentanarligi miðdepilin í býnum.

Í íslendska býnum Akureyri, sum er á støðd við Havnina, hevur kommunan innrættað mentanardepil í gomlum virkisbygningum í miðbýnum. Hesin býlingur verður nú kallaður Listagilið, og her eru verkstovur hjá listafólki, spælistøð, høli til framsýningar og framførslur, kaffistovu og matstovu.

Arbeiðsbólkurin hugsar sær, at ein tílíkur listabýlingur kann skapast í Tórsgøtu við virksemi, ið kann breiða seg víðari fram við Vestaruvág út til Müllers Pakkhús og umhvørvið har.

*Arbeiðsbólkurin mælir til, at* ***ætlan verður løgd fyri Tórsgøtu****, sum kann geva møguleikar fyri einum livandi, spennandi og fjølbroyttum mentanarlívi í miðbýnum. Partur av ætlanini eigur at vera nýtt býarhús og bókasavn.*

### *Ársins William*

Øll tey listafólk og mentafólk, arbeiðsbólkurin hevur tosað við, hava eitt felags ynski: At fáa arbeiðsnáðir, frið og umstøður at kunna arbeiða eitt ávíst tíðarskeið við list síni burturav.

William Heinesen, sum hevur gjørt Havnina kenda um allan heim, var listamaður á fleiri ymiskum økjum og virkin í skaldskapi, myndlist, tónleiki og sjónleiki. Nú 100 ár eru liðin, síðani hann varð borin í heim, kundi býráðið hóskandi heiðrað

hansara minni á ein hátt, sum ivaleyst hevði glett hann meira enn nøkur standmynd og nakað heiðursmerki.

*Arbeiðsbólkurin mælir til, at Tórshavnar býráð á hvørjum árið á føðingardegi skaldsins letur* ***ársins William Heinesen-starvsløn*** *til eitt virkið listafólk at kunna fáa arbeiðsfrið í eitt ár, og at nevnd verður sett við listakønum fólki býráðsins vegna at tilnevna ársins listafólk.*

